*Helle T. Johansen*

# Langa leiðin

Stormurin ýldi og skrokkurin knarraði og brakaði, meðan teir bardu sær ígjøgnum monsunin. Stavnurin lyfti seg upp, og brast niður aftur á næstu alduna. Tað buldraði ógvusligt og alt skipið ristist.

Tað var seint um kvøldið í januar mánaði. Dagsins hiti inni á landi hevði skapt eitt hátrýst, sum nú var roynt at fáa útjavnað við at senda turran vindin út á hav. Teir lógu enn tætt við ekvator, og har kundi monsunurin verða ógvusligur.

Tórbjørn lá í koyggjuni og royndi at sova, men hann hevði úr at gera við at halda sær í koyggjuni. Hann lá á búkinum við ørmunum og beinunum út í hvør sítt horn fyri at halda sær føstum, men hóast hetta, var hann næstan blakaður úr koyggjuni, sum skipið rullaði. Tíbetur hevði hann ongantíð havt sjóverk, men sovið fekk hann ikki.

Ein onnur orsøk var helst eisini til, at hann ikki fann frið. Hann var farin at hugsa um Margareth. Fittu, sjarmerandi, vøkru skotsku Margareth.

Hann var farin út at trola sum 24 ára gamal. Tað hevði mangan verið hart lív í Norðsjónum, men teir fingu væl og vunnu nógvan pening. Tað var ikki smávegis fyri einum ungum dreingi, sum enn ikki átti hús og familju. Gaman í, skuldi hann forsyrgja mammuna. Hann var einasti sonurin, og hon sat heima so sorgarbundin. Hon nýtti tó ikki nógvan pening, einsamøll í lítlu lonini, so hann hevði fitt av peningi eftir.

Sum oftast seldu teir fiskin í Skotlandi. Tað var ein dagin teir vóru í Aberdeen og lossaðu, at hann hevði sæð Margareth fyri fyrstu ferð. Hann og nakrir av hinum monnum, vóru farnir í land. Teir høvdu fingið teirra part útgoldna, so nú skuldu kannast, hvat pengarnar kundu nýtast til harinni. Fyrst vildu teir keypa okkurt tinganest heim við til familjuna, og so skuldu teir á pub.

Meðan teir gingu runt í handlinum og hugdu, stóð eina gentu við diskin og eygleiddi teir. Tórbjørn var serstakur og sjarmerandi at líta á. Herðabreiður við stuttum ljósum hári, og eitt sindur hjólbeintur. Hann hevði eitt rullandi gongulag, sum flest sjómenn, men uppá ein øðrvísi sjarmerandi hátt. Morreyða føroysku troyggjan gjørdi greitt, at hann ikki var skoti, men hevði uppruna í einum øðrum og óivað forvitnisligum land. Í øllum førum dámdi Margareth hann, og tá ið Tórbjørn hugdi at henni, blunkaði hon til hansara og smíltist yndisliga.

Margareth var sera vøkur. Kløn var hon, men tó við passandi fylla á røttum støðum. Hon hevði brúnt, purlut, langt hár, og eygu so grøn sum hjá kettu. Hon gekk elegant og lættliga aftur og fram aftanfyri diskin, í snøgga, tættsitandi kjólanum.

- Hava tit sæð hesa eiggiligu steikina? Spurdi bátmaðurin, meðan hann rullaði við eygunum og sleikti sær um munnin.

- Ja, hon kundi gott sloppa at hita koyggjuna hjá mær, tók hjálparkokkurin til. Teir flentu allir, og hildu á við at hugleiða um, hvat Margareth kundi sleppa at gera.

Tórbjørn segði einki, men gjørdi ístaðin skjótt av og skundaði sær við sítt mest sjarmerandi smíli fram til diskin.

- Halló, royndi hann varisliga á sínum hálvbrotna ensku. - Sum títt gongulag er, eri eg vísur í, at tú dugir ómetaliga væl at dansa. Er tað møguligt at tú kennir eitt gott stað, har tú kanst læra mær at dansa?

- Jú, tað kann eg kanska gott, svaraði hon aftur við titrandi eygum. – Eg ætli mær á Pub RedLight í kvøld, so um tú hevur hug at dansa, kanst tú møta mær har klokkan níggju í kvøld!.

Tórbjørn kendi tað næstan, sum dugdi hann at flúgva, tá ið teir fóru úr handlinum, og errin var hann av, at hann – júst, hann – hevði gjørt avtalu við Margareth. Mmmmh. Margareth. Eitt vælsmakkandi og vakurt navn til ein vakra gentu.

Hinir sjómenninir argaðu hann og slógu hann á herðarnar.

- Nú, gamli. Tú dugir væl at trola, ha? Ansa nú eftir meskastøddini, um tú fært at fáa tær eitt lýsingarhál, flentu teir.

Tórbjørn flenti bara við og gleddi seg. Hann visti, at teir bara vóru øvundsjúkir. Tað var tó ikki heilt frítt, at hansara runda andlit fekk eitt reydligt dám.

Jú. Tey vórðu góð, Margareth og hann. Tey gjørdust par. Hann var so góður við hana, og keypti henni nógvar gávur og prýðislutir. Skipið hann sigldi við, landaði ofta í Aberdeen, og so skjótt hann slapp leysur, fór hann niðan í handlinum at hitta Margareth. Var tað um náttina, fór hann heim til hennara, og blakaði smásteinar á vindeyganum hjá henni. Tá skuldi hann tó ansa sær. Pápi hennara var ein sera strangur og konservativur bankamaður. Hann ætlaði avgjørt ikki, at dóttir hansara skuldi hitta ein sjómann. Hon skuldi giftast við bókhaldaranum, um tað stóð til pápan.

Tórbjørn og Margareth høvdu mangan teskað um, hvussu hann kundi hjálpa henni at rýma. Hann skuldi goyma hana í kamarinum hjá sær, og taka hana við til Føroyar.

So ein dagin, hann kom til Aberdeen, var Margareth ikki at finna í handlinum. Tá ið hann spurdi eftir henni, fekk hann tey boðini, at hon var vorðin gift við einum ríkmaðnni úr London og var flutt hagar.

Tað tók honum dygt og tætt. Hann sum helt, at hann hevði funnið kærleikan, og so hevði hon narrað hann. Hann hevði ikki hug at halda fram á sama skipið, sum hann visti vildi koma aftur til Aberdeen. Her vóru ov nógv minnir. Hann vildi sleppa langt burtur. Hann skifti tí hýru til eitt skip, sum var á veg eystureftir til Hong Kong.

Tórbjørn sigldi í nógv ár í fjareystri. Har var eisini nógvur peningur at vinna, nógv forvitnislig lond, og nógvar vakrar blíðar kvinnur. Hann helt sjálvur, at hann hevði gloymt alt um Margareth, um fríska lotið í Føroyum, og um mamman. Alt tað hoyrdi einum øðrum lívi til.

Men so ein dagin teir lógu í Singapore, møtti hann Pæturi, einum føroyskum skipara, sum hann kendi heimanífrá. Teir komu at tosa um heimbygdina, og Pætur segði frá, at mamman var vorðin gomul og skirvislig. Hon megnaði sjálvt ikki at binda longur. Tað einasti hon fór út til, var at fara í kirkju sunnumorgun. Illa gongd sum hon var, stríddi hon seg avstað, tí biðja fyri Tórbjørni, og fyri sálini hjá pápa hansara, sum var sjólátin, og fyri stórabeiggjanum, sum var deyður sum heilt ungur av menigitis, tað vildi hon.

Tórbjørn mintist, hvussu mamman altíð sat við vindeyganum og hugdi syrgin út yvir fjørðin, meðan stokkarnar glintaðu í hondunum á henni. Henni dámdi einki, tá ið hann fór út at dyrgja. Hon vildi helst, at hann sat heima hjá henni.

Sum ungur drongur var tað sjálvsagt einki spennandi hjá honum, og hann fór tí út at sigla, fyri at slíta nalvastreingin. Hann orkaði ikki, at hon altíð krøkti seg so í hann, og hvørjar ferð hann fór út at dyrgja, sat hon heima og græt og gav honum ringa samvitsku.

Aftaná mongu árini í fjareystri, sá hann knappliga mamma síni í eitt heilt øðrum ljósi. Sjálvandi hevði hon syrgt og verið bangin. Hon hevði mist tveir av sínum kæru, og vildi ikki missa ein afturat. Tí hevði hon krøkt seg so í hann. Og hvat hevði hann gjørt? Hann var rýmdur, so hon nú sat púra einsamøll eftir.

Tórbjørn skundaði sær í land og fekk seymað ein silkistakk til mammuna, og tá ið føroyska skipið við Pæturi sum skipara helt heim aftur, var hann við umborð.

Nú bardu teir sær so gjøgnum monsunin, á teirra veg heim til Føroyar.

Hann visti, at teir komu at sigla fram við Skotlandi, og at hann tá vildi leingist eftir tíðini saman við Margareth, og øllum teimum góðu løtunum, tey høvdu í Aberdeen.
Men Margareth var farin, og tað var tíðina í fjareystri eisini, hann hevði tað við sær í minninum. Nú var tað mamman tað snúði seg um. Hann visti ikki, hvussu leingi afturat hann fór at hava hana, men hann vildi gera, hvat hann kundi, fyri at lætta um hjá henni seinasta tíðina.

.....

Tíggju ár seinni fór Tórbjørn aftur út at dyrgja Mamman var farin okkurt um eitt ár eftir, at hann var komin heim. Stillisliga var hon sovnað burtur, við hond hansara í síni. Nú syrgdi hon ikki meira.
Við sær í bátinum hevði hann ein lítlan drong við stuttum, ljósum hári. Ein boysin piltur, sum spurdi um alt, og sum íðin royndi at gera alt eftir, sum pápin gjørdi.

Í góðum veðri hann dyrgdi, heilt uppi við Eystfalssker.

© Helle T. Johansen 2008. All rights reserved.
*Tað er strangliga banna at nýta tekstin, ella partar av honum, uttan høvundans loyvi.*